# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# YUPPI-KAPITALISMAN SPÆLT FALLIT

Summi ristu við høvdinum eftir íslendsku nýkapitalistunum, sum eftir aldaskiftið royndu at leggja heimin allan fyri føtur sínar. Hóast alt tyktist ganga so væl, so vóru ávaringarrøddir frammi, sum vístu á, at hetta var eitt korthús, um ikki kundi annað enn rapa.

Kortini vóru nógvir føroyingar, ið eltu íslendingar. Bæði kapitalistar og so tey, sum av tjóðskaparligum orsøkum eiga at halda, at íslendingar eru klókari enn vit - og klókari enn danir. Tann seinasti føroyingurin, sum var íslendskur konsul í Føroyum speirak sínar landsmenn alment í sjónvarpinum, tí teir vóru so afturhaldnir, meðan íslendingar altíð hava gingið undan. Føroyingur í Íslandi, sum stjórnaði stórum virksemi hjá einum øðrum føroyingi legði somu sjónarmið fram um føroyingar í Sosialinum. Føroyska dynastiið í Íslandi er fánað, og fyrrverandi konsulin hevur mist nógvar hundraðtals milliónir, tí hann gjørdi sum teir gløggu íslendingarnir.

Her heima hava vit sæð nógvar handlar í vinnulívinum, har virksemi og vinnutól eru seld fyri ørandi upphæddir, men alt bar til, tí fígging og góð ráðgeving fekst. Íslendska árinið rakti eisini Føroyar, um enn tað tók sína tíð. Vit kunnu bara takka fyri, at føroyingar eru so afturhaldnir, at vit ikki settu alt yvir stýr.

Tað er einki dulsmál, at Eik Banki hevur gingið fyri at vera tann mest íslendifiseraði stovnurin í so máta í Føroyum. Gamli stjórin í Føroya Banka var speirikin, tí hann var so afturhaldin. Sagt var, at munur var á Føroya Banka og Eik - Eik, sum tordi, og so Føroya Banki við einum konservativum donskum stjóra, sum einki tordi. Tak bankan í dag!

Hvør endin verður í evsta tíma í morgin klokkan 18, er tað eingin sum veit. Klókir menn siga, at bankin ikki kann fara av knóranum, tí um landið ikki loftar, so verður tað Financiel Stabilitet, sum ger tað. Og gott er tað, um viðskiftafólk kunnu kenna seg trygg um síni viðurskifti.




Men tað kunnu partaeigararnir neyvan. Sera nógv fólk eru lokkað at seta partapening í Eik, og tey eru ikki fegin um ta lagnu, sum stjórn og nevnd hava komið bankanum í - og harvið forkomið sparipeningi, sum er konverteraður til partabrøv. Passar tað so, at stjórarnir hava fingið milliónaupphæddir fyri at fara, so prógvar tað totala mangulin upp á jørðforbindilsi, sum hesi fólkini hava. Um skomm var skapt í hasum stjórunum, so lótu teir hasar pengarnar aftur - og nevndin eigur øll sum hon er at fáa durafjórðingin.

**» Um skomm var skapt tóku stjórarnir ikki móti pengunum**

## Odd fær slakar 40.000 krónur

Tey, ið hva koyrt Eik Banka á ørmundarhús smyrja væl og virðiliga knívin. Meðan stjórarnir kunnu leggja seg afturá við fleiri milliónum á eini tryggari bankakonto, so fær Odd Bjellvåg nú eisini lønarhækking.



Nevndarformaðurin fær 37.500 krónur um mánaðin í løn frá Eik Banka. Næstformaðurin fær 25.000, meðan hinir nevndarlimirnir fáa 10.500 krónur

## So kom stóra ævintýrbókin

Bukkarnir Brúsi, Eldførið, Tornarósa, Mishátti Dunnuungin og Reyðheytta eru nøkur av kendu ævintýrunum í Stóru ævintýrbókini, sum nú kom út.

Ævintýr hava ein serligan eginleika at hugtaka børn og vaksin. Líkamikið hvussu ofta tú hevur lisið ella hoyrt sama ævintýr, so troyttast tú ikki av tí. Heldur ikki, tá tú dugir ævintýrið uttanat. Tornarósa er altíð líka vøkur og trøllið líka ljótt og ræðuligt.

Ævintýr eru tíðarleys, men viðgera evni, sum øll eru áhugað í. Hjá børnum er tað tó serliga stríðið millum tað góða og tað ónda, sum er í hásæti, og tað, børnini serliga bíta merki í. Trøll, óndar stjúkmammur og ræðuligir úlvar gera frásøgnina spennandi og ikki minst ræðandi. men hóast ræðandi eru ævintýrini ikki ov ræðandi. Onkursvegna hava ævintýrini funnið ta fullkomnu javnvágina.

Í bókini eru átta av bestu og kendastu ævintýrunum. Talan er um teir tríggjar bukkarnar Brúsi, Eldførið, Tornarósu, Mishátta dunnuungan, Býartónleikararnar í Bremen, Mannin, sum skuldi halda hús, Reyðhúgvu og Pannukøkuna. Hetta eru ævintýr, sum Asbjørnsen og Moe, H. C. Andersen og brøðurnir Grimm hava savnað. Felags fyri ævintýrini er, at tað er Svend Otto S, sum hevur myndprýtt øll ævintýrini.



Tvey ævintýr, Pannukøkan og Maðurin sum skuldi halda hús, koma á fyrsta sinni út í føroyskari týðing. Hini seks eru øll komin út á føroyskum fyrr.

Niels Jákup Thomsen, Pauli Hansen, Marius Johannesen, Hervør Jákupsson og Amy Tausen týddu. Bókin, sum Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur út, er 216 blaðsíður.



**» Mission accomplished**

HØGNI HOYDAL
KJAK Á SÍÐU 38



**» Talgilt tilfar til talgildan veruleika**

SÁMAL MATRAS
KRISTIANSEN
KJAK Á SÍÐU 14



## Glaðir millionerar

»Gylta lógvatakið« er eitt kent hugtak - serliga í bankaheiminum.

»Gylta lógvatakið« er ein stór peningaupphædd, sum verður goldin stjóra, sum fer frá í ótíð av tí at gjørd er ein fráfaringaravtala. Upphæddirnar kunnu vera rættiliga stórar.

Tað var eisini tað sum hendi í Eik hendan dagin. Fíggjareftirlitið hevur kravt leiðsluna frá, og so má sáttmálin sjálvandi haldast. Hvør fráfaringarlønin er, vil bankin ikki upplýsa, men tað kemur so fyri ein dag, tá rokniskapurin verður lagdur fram. Upphæddir upp á fleiri milliónir hava verið nevndar. Falda vit mánaðarlønina hjá forstjóranum við uppsagnartíðini, so fáa vit 250.000 ferðir 18, sum gevur hálva fimtu milliónir krónur.

*Vit halda:*
*at tað er ikki eiti á frekleika, um tað passar, at Eikstjórarnir hava fingið nær námind hesi upphædd. Hetta vísir týðuliga, at hesir menn - og nevndin, sum hevur ásett teimum hesa lønina, als einki jørðforbindilsi hava. Hvussu skulu slík fólk klára at reka ein banka skilagott?*

*Vit áttu at fingið eina lóg, sum vardi borgaran móti slíkari egoistiskari eyðrøning. Meinigi føroyingur missir síni partabrøv - sum kanska eru keypt fyri læntar pengar, meðan teir, ið ábyrgdina hava, liva í súsi og dúsi. Tað er so hamrandi órættvíst!*

**Sosialurin** Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*